Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 23. desember 2005



**Mafiabossar - italienskur dokumentarfilmur**

Al Capone var ein harðrendur einaræðisharri í Chicago, men so varð hann handtikin í sambandi við eitt heilt vanligt skattamál. Sendingin hyggur eisini eftir mafiosum í New York. Ein av teimum var Joe Masserie, ið gjørdi um seg fyrst í 1900-talinum. Joe tók sær av fleiri gangastarum og hevði teir í læru - mafian hevði sína egnu skúlaskipan.

**2. jólakvøld - mánadag 26. kl. 18.10**



**Ymisk lív 4**

Ymisk lív setur enn einaferð fokus á, hvussu ymiskir vit føroyingar eru.
Nógvar smágentur droyma um at hitta prinsin á tí hvíta hestinum, sum kann geva teimum dreymatilveruna. Sum vaksnar velja kvinnurnar tó eina tilveru, sum er meira í tráð við teirra ynskir.Ymisk lív hittir hesaferð tvær kvinnur við ógvuliga ymiskum lívsstíli og lívsáskoðan.

**Jóladagur - sunnudag 25. kl. 20.00**

**Jólakonsert úr Oslo - Sissel Kyrkjebø luttekur**

Aftur í ár hava tey á SvF fingið fatur jólakonsert, sum norski Frelsunarherurin skipar fyri í Oslo. Millum tey sum syngja er Syssel Kyrkjebø, og vit skulu eisini hoyra kenda krimirithøvundan Jo Nesbø syngja jólavísu

**Jólaaftan - leygardag 24. kl. 21.45**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**